Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Sjúkrarøktarfrøðingar og lønarlyft

Spurningar:

1. Hvør er orsøkin til, at sjúkrarøktarfrøðingarnir eru valdir frá, nú samgongan ætlar at lyfta lønirnar hjá útvaldum starvsbólkum á umsorganarøkinum?
2. Hevur útihýsingin av sjúkrarøktarfrøðingunum nakað við sáttmála-samráðingarnar í 2017 at gera, tá sjúkrarøktarfrøðingarnir nýttu verkfalsrættin til at koma til eitt rímiligt úrslit?
3. Væntar landsstýrismaðurin, at tað eggjar fólki at lesa sjúkrarøktarfrøði, sum er hægsta útbúgving innan umsorganarøkið, tá starvsbólkurin verður útihýstur í samband við lønarlyftið?
4. Er tað eftir avtalu við felagið hjá sjúkrarøktarfrøðingum, at hesin starvsbólkur ikki fær eitt lønarlyft ?

Viðmerkingar:
Í sambandi við nógv umrødda lønarlyftið til útvaldar bólkar á umsorganarøkinum er tað undrunarvert, at sjúkrarøktarfrøðingar verða valdir frá. Í 1969 vórðu tær flokkaðar í lægri lønarflokk enn mennirnir, tí tær høvdu ikki forsyrgjaraskyldu, og fyri ikki so nógvum árum síðan í krepputíðum fóru sjúkrarøktarfrøðingar niður í løn fyri at vísa samfelagssinni. Við samráðingunum í 2017 ynsktu sjúkrarøktarfrøðingarnir at gera upp við reformin í 1969 og lønarniðurskurðin undir kreppuni.

Løgmaður hevur sagt fleiri ferðir, at tey, sum starvast á umsorganarøkinum, skulu upp í løn, at tað er upp á tíðina, at kvinnufakini fáa eitt uppiborið lønarlyft, og at tá umsorganarøkini virka optimalt, eru tað ikki bara starvsfólkini sum vinna, men eisini brúkarin og avvarðandi. Hesi orð samsvara ikki við, at sjúkrarøktarfrøðingar ikki fáa lut í lønarlyftinum.

Neyvan ynskir nakar at seta starvsbólkar upp móti hvørjum øðrum, men tað er undrunarvert, at allir starvsbólkar á umsorganarøkinum ikki fáa eitt lønarlyft. Tá lønarlyftið verður gjørt til eitt stríð um kvinnurættindi, men sjúkrarøktarfrøðingarnir ikki verða tiknir við, er spurningurin, um tað skal fatast sum vantandi virðing fyri sjúkrarøktarfrøðingum og fyri javnstøðustríðnum.

Á Løgtingi, 24. apríl 2023

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
løgtingsmaður